VIÐMERKINGAR

# Eldrapolitikkur – tá vit ikki klára okkum sjálvi longur vegna ellisbrek

**Hallbjørg Hansen, Fuglafirði**
*Valevni tjóðveldisfloksins í Eysturoynni*



Sjálvsagt er tað at blíva gamal, ikki orsøk til at vit skulu gerast til ”klientar” hjá samfelagnum.Tað at blíva eldri bíðar okkum øllum, um so er at okkum verður langt lív laga, og harvið fylgja ofta ellisbrek. Hví hava vit so ikki fyri langari tíð síðani gjørt neyðugu íløgurnar í samfelagnum, soleiðis, at tey eldru, sum ikki longur klára seg sjálvi, kunnu hava eina virðiliga tilveru? – Hetta kann helst bara skyldast, at politikkarnir ikki hava havt nóg stóran áhuga fyri hesum máli, ella ikki hava kent sær ábyrgd av hesum.

Tíðliga í sjeytiárunum fingu vit eina tænastu, sum eitur heimahjálp. Ein sonn hjálp fyri tey, ið ikki kláraðu húsarhaldið sjálvi og ikki minst fyri tey, ið vóru púra óhjálpin. Tað vísti seg tó seinni, at hetta projektið, sum so mangt annað, ið varð bygt upp eftir útlendskum leisti, ikki kundi varðveita tænastustøði, tá tíðirnar versnaðu.

Nú er so komið hartil, at Heimarøktin er stovnað. Hetta er ein tænasta, sum verður røkt av bæði sjúkrasystrum og heimahjálpum. Hendan tænastan er ein ómetaliga stór hjálp fyri tey, ið krevja røkt heima hjá sær sjálvum, og ikki minst fyri teirra avvarðandi. Hendan skipan skal tí víðkast so vítt gjørligt til eisini at umfata døgnrøkt, har hetta letur seg gera.

Fyri at hjálpa teimum eldru, sum ikki longur klára seg í egnum heimi, fóru fleiri kommunur undir at reka sambýlir. Hetta hevur víst seg at virka væl, tó at sambýlini nú líkjast alt meira røktarheimum.

Tað vísir seg tó, at tørvurin á røkt veksur alsamt, sum vit gerast eldri og eldri. Hetta ger, at vit als ikki kunnu lata okkum lynda, ikki at útbyggja røktarpláss til hesar okkara borgarar.

Í Eysturoynni varð eitt røktarheim bygt í fyrru helvt av áttatiárunum. Hetta varð seinni útbygt, soleiðis at pláss eru fyri 42 búfólkum. Flestu kommunurnar í oynni samstarva um hetta heimið. Ætlanir eru frammi í hesum døgum um at útbyggja heimið, men eru ikki allar kommunurnar heilt samdar um tað. Sjálvt um hendan ætlan verður framd, t.v.s. við 24 plássum aftrat, so nøktar hendan so langt ífrá tørvin.

Tjóðveldisflokkurin hevur sum mál fyri eldrapolitikkin, at íløgur í ellis- og røktarheim og eldrasambýli verða raðfestar beinanvegin í samstarvi millum land og kommunur við tí endamáli, at øll við tørvi fáa tilboð um pláss innan ásetta tíð. Seinasta valskeið hevur flokkurin staði á odda fyri einum fíggjarpolitikki, ið ger, at vit eru nógv nærri einum sjálvbjargnum Føroyum, enn nakrantíð fyrr, síðani vit fingu heimastýrislógina.

Undirritaða heldur, at tað hevur alstóran týdning at nakað verður gjørt á økinum beinanvegin. Eisini eiga vit at hugsa um, at vit, tá vit gerast eldri, ikki hava nakað ynski um, at verða goymd burtur, men at vit hava møguleikan at verða ”passaði” so nær okkara egna umhvørvi sum gjørligt, og at vera mitt í dagliga lívinum í lokalsamfelagnum, helst soleiðis, at til ber at fylgja við tí, sum hendir uttanfyri, sjálvt um ein sjálvur ikki kann luttaka longur.

Umframt vanlig røktarheim eiga vit eisini at hugsa um okkara ”dementu”, sum eisini verða alsamt fleiri í tali. Umstøður skulu útvegast, soleiðis at hesi eisini kunnu hava eitt trygt stað at vera, uttan at vera til ampa fyri seg sjálvi onnur búfólk, har tey nú húsast. Hetta kann gerast við at útvega smærri heim, sum ikki líkjast stovnum.

# Ilt er at tæna tveimum harrum

**Petur Simonsen**
*valevni fyri Tjóðveldisflokin*

Dag og dagliga vísa valevnir hjá andstøðuflokkunum á, at Føroyski búskapurin er yvirupphitaður og er í skeljasori, at stórt hall er á fíggjarlógini fyri 2002 og at stórt undirskot er á handilsjavnanum.

Somu flokkar hava hetta valskeiðið, og ikki minst nú í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógini fyri 2002, lagt eitt uppskoti fyri og annað eftir, sum høvdu økt útreiðslurnar hjá landskassanum við hundratals millíónum, vórðu tey samtykt. Um somu tíð mæla somu flokkar til skattalætta og avgjaldslækkingar. Og dúgliga hevur verið ilskast inn á varisliga fíggjarpolitikkin hjá Karstini.

**Høvuðrokning og búskapur**

Jógvan Ingvard sigur í grein um dagarnar, at hann í síni tíð lærdi høvuðrokning. Fleiri við honum gjørdu og gera tað og hava góða nyttu av hesum. Eitt nú, sum í hesum málinum um búskap og vallyftir. Tað nýtist ikki nøkur framkomin roknimaskina ella telda til at stafesta, at roknistykki ikki gongur upp. Vanlig høvuðrokning er nóg mikið.

- Um búskapurin er yvirupphitaður, er tað so eitt gott hugskot at seta enn fleiri almennar ætlanir í verk. Vanlig høvuðrokning sigur nei.
- Er tað skilagott at økja eftirspurningin, um handiljavnvágin er tann skeiva vegin. Høvuðrokningin kemur til sama úrslit - eitt nei.
- Um nú búskapurin var í skeljasori, er tað so rætt við einum minni varligum fíggjarpolitikki við eitt nú skatta- og avgjaldslækkingum. Jógvan Ingvard og vit onnur, sum brúka vanliga høvuðrokning siga nei og aftur nei.

**Javnvág ella aftur til kjøtgrýturnar**

Ilt er at tæna tveimum harrum. Tað vita vit øll, og tað vita nútíðar sambandsmenn saktans eisini. Men kanska skuldi Jógvan Ingvard kortini havt nakrar tímar í høvuðrokning við sínum eftirfylgjarum. Eisini kundi hann sagt teimum frá vísdómsorðunum hjá partamanninum og fyrverandi fíggjarmálaráðharranum, at á fíggjarlógini er talan um tvær síður. Eina inntøkusíðu og eina útreiðslusíðu. Og at tú sleppir ikki væl frá at økja um útreiðslurnar uttan so, at inntøkurnar eisini gerast størri.

Men kanska er tað júst her, sambandsflokkarnir síggja sín møguleika, at fáa ójavna í, soleiðis at kravið, um at blokkurin skal økjast aftur, gerst sterkari.

Teir vita, at hendir tað, at blokkurin ikki minkar næstu árini ella enntá veksur aftur, er fulveldistilgongdin steðgað fyribils. Og kanska er tað ikki, sum tað sær út til í fyrsta lagi, at andstøðuflokkarnir ikki duga sína høvuðrokning og tí tæna tveimum harrum. Nei, helst tæna teir kortini bert tí eina harranum - sambandshugsjónin. At okkara vælferð eisini framyvir skal tengjast at peningarenslinum úr Danmørk.

Búskapur, vælferð, skattalættar, handilsjavnvág og fíggjarlóg eru bert orð, ið verða nýtt hvørt um annað í stríðnum, at steðga fulveldistilgongdini.

**Framtíðin**

Hóast ósamdir um mangt, er tað neyvan tað, føroyski veljarin vil. Tað, at steðga fulveldistilgongdini. Nei, hann vil taka við ábyrgdini av egnum landi. Hann vil taka við avbjóðingini av at skipa fyri egnari vælferð, bæði í viðgongd og tá ikki alt gongur, sum eftir ánni. Hann vil byggja land við tí tilfeingi og teimum evnum, sum skaparin gav. Føroyski veljarin vil sjálvbjargni.

# Fígging av havnaútbyggingum

**Jákup Lamhauge**
*Valevni Sambandsflokksins*



Hevur landsstýrið eina veruliga almenna ætlan um fígging av havnaútbyggingum - ella er ætlanin,at bert einstakar ávísar kommunur skulu fáa fíggjarligan stuðul úr landskassanum?

Sum eina av avleiðingunum av kreppustøðu Føroya miðskeiðis í nítiárunum tóku landsmyndugleikarnir ta avgerð,at avtaka alla stuðulsveitingina til føroysku kommunurnar - herundir eisini stuðulsveitanina til havnagerðir,sum hevði verið galdandi mongu árini framman undan.

Sjálvandi kom hetta illa við hjá føroysku kommununum, sum í flestu førum vóru sera illa fyri fíggjarliga, men hinvegin so sóu kommunurnar, at hetta vóru neyðug stig, sum máttu takast í eini roynd at fáa landskassans fíggjarviðurskifti aftur á beint.

Sum árini eru gingin, so hava føroysku kommunurnar vant seg við hesar umstøður og hava tillagað síni fíggjarligu viðurskifti samsvarandi - hóast at hesi í mongum føri hava verið og framvegis eru sera trong.

Men hvat er við at henda á stuðulsøkinum í dag?

Seinru árini hava verið uppgangstíðir í føroyska samfelagnum - peningur hevur streymað inn í føroyska landskassan - ja vit hoyra javnan fíggjarmálaráðharran reypa um, at tvær milliardir eru í landsbankanum. Tað er tí kanska ikki at undrast yvir risastóru íløguætlanir landsstýrisisn sum komnar eru fyri dagin - ferjur – undir- og yvirsjóvartunnlar – ferjulegur – íløgur sum samanlagt kosta samfelagnum í milliarda upphæddum.

Talan í hesum føri er um økisstuðul sum í hesum tíðum verður tosað so mikið um, og munnu flestu føroyingar eisini fegnast um at stig verða tikin til tess at sambinda oyggjarnar nærri meginøkinum.

Men tað sum ein kann seta spurnartekin við, eru seinastu tíðindini um, at nú fer landskassin at veita peningaligan stuðul til ávísar kommunur til havnaútbyggingar - nevniliga til Vágs, Tvøroyarar og Tórshavnar kommunur. At landsstýrið letur nevndu kommunum peningaligan stuðul er teirra avgerð, men so má kravið eisini vera, at aðrar kommunur eisini fáa stuðul til havnagerðir – øll í hesum lítla samfelag mugu vera eins fyri lógini - tað er minsta krav.

**Runavíkar Kommuna byggir eisini út havnalagið.**

Til tess at gera betur umstøður fyri vinnulívið hevur Runavíkar Kommuna seinastu trý árini gjørt íløgur til víðkan av havnalagnum uppá uml. 18 mill. kr. - uttan at hava fingið eina krónu úr landskassanum.

Sum nevnt omanfyri so er talan um at gera umstøðurnar fyri vinnuna betur - her er talan um fiskivinnuna, farmavinnuna, alivinnuna og nú eisini til oljuvinnuna - talan er um virksemi sum ikki bert kemur lokaláhugamálunum tilgóðar, men sanniliga eisini landsáhugamálinum.

Eysturoy er sum kunnugt vinnumiðdepulin í landinum, sum er við til at leggja fíggjarliga grundarlagi - ikki minst fyri landskassan - tað má tí vera ein sjálvfylgja at hetta øki fær somu sømdir sum onnur øki í landinum.

Áhugavert verður at vita hvat løgtingið fer at gera við henda viðkomandi spurning.

# Fullveldi Føroyar og olympiska viðurkenningin

**Ivan Eginsson**



Altjóða viðurkenningin kemur sum ein sjálvfylgja, tá ið Føroyar gerast ein suverenur statur.

Fyri nøkrum døgum síðani bórust tíðindini í fjølmiðlunum um, at danski forsætisráðharrin ikki vil skunda sær við at geva Føroyum grønt ljós við føroysku umsøknini um fullan limaskap í Altjóða Olympiska Sambandinum (IOC).

Orsøkin er sjálvandi bara ein — ríkisrættarliga støðan hjá Føroyum. Í heimsparti okkara, Evropa, kenna vit einki dømi - ikki eitt einasta - fyri, at eitt land uttan fullan suverenitet hevur fingið limaskap í hesum nevnda felagsskapinum. Nei — heldur ei Skotland, Wales og Norðurírland, sum, eins og Føroyar, luttaka í altjóða fótbóltskappingum, kunnu hugsa um nakra olympiska viðurkenning. Hesi londini eru — saman við Onglandi - partar av ríkinum, ið kallast Stóra Bretland. Og tað er bara Stóra Bretland, sum sendir eitt, og ikki fýra lið, til olympisku leikirnar (spurningurin er so, hvussu ein tjóskaparsinnaður skotskur ítróttarmaður, sum vinnur eitt gult heiðursmerki, hevur tað innast inni, tá ið viðkomandi verður noyddur til at hoyra “God Save the Queen”, og ikki “Flower of Scotland” — sær til heiðurs, og renna “heiðursumfar” við einum bretskum, og ikki sínum egna — skotska - flaggi).

Sum nú er, hava Føroyar ongan sum helst rætt til at gerast limur í olympisku familjuni. Hví skal eitt hjáveldi (Føroyar) fáa undantaksloyvi, tá ið onnur (t.d. tey nevndu Skotland ella Wales, men eisini Baskaraland, Katalonia, Korsika, Montenegro, Grønland, Áland, tey russisku so-kallaðu “sjálvstýrandi lýðveldini”, so sum Tatarstan ella Tjetjenia, og nógv, nógv hjálond afturat) undir ongum umstøðum kunnu fáa tað? Hví skulu danskir statsborgarar, búsetandi í Føroyum, leypa framav, tá ið donsk ítróttarfólk umboða eisini teir (sjálvt um eingin føroyingur er á danska olympiska liðnum) í Sydney,Salt Lake City ella hvar tað einaferð skuldi vera?

Og tí hava vit onga sum helst orsøk til at finnast at danska forsætisráðharranum. Anders Fogh Rasmussen hevði havt fullkomiliga rætt, bæði løgfrøðiliga og moralskt, við ikki at givið einum parti av danska ríkisfelagsskapinum (Føroyum) nakra tilsøgn um sjálvstøðugan limaskap — forsætisráðharrin kann ikki gera nakað annað.

Men hvørjar forðingar við at fáa nevnda limaskapin hevur eitt land, ið vinnur sær fult politiskt frælsi? Svarið er greitt og einfalt — ongar! Fyrst í nítiárunum blivu Litava, Lettland, Estland, Ukraina, Hvítarussland, Kroatia, Slovenia, Slovakia (bara fyri at nevna nøkur) nýggj sjálvstøðug lond í heimsparti okkara. Nakrar mánaðir seinni fingu øll hesi londini limaskap í IOC (eins og í ST, og øllum øðrum áltjóða felagsskapum). Tær tjóðirnar, ið einaferð vóru avmarkaðar á so nógvan hátt av Sovjet ella Jugoslavia, fingu loksins møguleika til at fyrireika, og síðan vísa heiminum sínu egnu ítróttarfólk... Og tey vinna nógv heiðursmerki eisini og gera lond síni so nógv sjónligari á heimskortinum!

Tað, sum altíð hevur undrað undirritaða almikið, er — hvussu ber tað til, at núverandi forsetin í Ítróttarsambandi Føroya, ið í grundini átti at stríðst við allari orku fyri áltjóða ítróttarviðurkenning av føroysku tjóðini (eg vil gjarna trúgva, at hann ger tað), er ikki bara ein vanligur sambandsmaður, men eisini framstandandi politikari í Sambandsflokkinum. Í einum “unionistaflokki”, ið ger alt møguligt fyri at avmarka møguleikarnar hjá føroyingum at umboða seg beinleiðis í áltjóða høpi, í einum og hvørjum samanhangi. Hvør annar, um ikki sambandsvalevnið Heðin Mortensen, átti at skilt, hvussu umráðandi tað er hjá einum landi at hava fult sjálvstýri, fyri at gera seg galdandi á áltjóða olympiska pallinum.

Og skeivt fara tey, ið halda, at lond, sum Føroyar, einki sum helst hava á olympiska pallinum at gera (”_vit hava ongan kjans til at vinna nakað álíkavæl_”)! Dagarnir í februar 1980 verða ongantíð gloymdir í Liktinstein (fólkatalið er ikki meira enn 28.000 har). So at siga allir íbúgvarnir grótu av gleði og stoltleika fyri pinkalítla land sítt, tá ið Hanni Wenzel vann tvey gull og eitt silvur í skíðrenning, og beiggi hennara Andreas fekk vann eisini silvur í somu ítróttargrein á olympisku vetrarleikunum í Lake Placid... Liktinstein sló navn sítt fast í olympisku søguni (eisini tí tað vóru fyrstu systir og bróður nakrantíð, ið bæði vunnu olympisk heiðursmerkir), og hetta bragdið hjá systkjunum er, sambært liktinsteinarum sjálvum, tann týdningarmiklasta hendingin í søgu landsins í XX.øld! Men hevði Liktinstein verið (hví ikki?) partur av Týsklandi, Eysturríki ella Sveits? So var tað fantastiska bragdið hjá Wenzel-systkjunum báðum longu gloymdur í hvørjum av hesum trimum londunum. Tí tað er bert í pinkulítlum londum at fólk taka avrikini hjá landsmonnum sínum so mikið persónligt, sum tað var teirra egni sigur...

Undirritaði hevur arbeitt, sum blaðfólk, á tí allarstørsta ítróttarblaðnum í Evropa (860.000 eintøk um dagin), og er framvegis free-lancari har. Tí kann undirritaði onkursvegna rópa seg fyri fakmann, tá ið undirritaði skrivar um ítróttarlig viðurskifti, eisini treytir fyri altjóða olympisku viðurkenning, galdandi í Evropa. Tí havi eg eina greiða støðu í hesum málinum og vil heita á føroysk ítróttarfólk og tey, ið vilja ein dag síggja føroyingar luttakandi í olympisku leikunum á jøvnum føti við USA og Russland, Noreg og Danmørk, Týskland og Liktinstein — stuðlið teimum politisku kreftunum her heima, ið fegnar vilja vinna landinum áltjóða viðurkenning — í ítrótti, sum í øllum øðrum. Stuðlið teimum, sum stríðist fyri fullum politiskum frælsi fyri Føroyaland — tá fáa føroyingar kanska ein dag sínar egnu olympisku hetjur, síni egnu føroysku Hanni og Andreas Wenzel. Annars er bara eftir at hyggja at øðrum - Wilson Kipketer, Bjørn Dæhlie og teimum. Kundi tað verið eins stuttligt fyri tykkum, FØROYINGAR?

P.S. Eg var longu liðugur við grein míni, tá ið eg datt á viðmerkingina hjá sambandsvalevninum Bent Jákupi Hansen "OL-viðurkenning. Politikkur gruggar málið". Eg havi bert ein spurning til og Bent Jákup og Heðin ÍSF-forsetan í hesum sambandi: "Hvussu nógv ósjálvstøðug evropeisk lond hava ella hava nakrantíð havt olympiska viðurkenning?". Vit vita allir tríggir, at svarið er: "einki"! Hví skulu Føroyar vera betri enn hini evropeisku hjálondini? Og hetta við fótbólti, vit minnast væl, hvussu nógv ár gingu og hvussu nógv stríð var, áðrenn føroyingar loksins fingu limaskap í FIFA (sum støðan er í 2002, høvdu Foroyar aldrin verið so hepnar, sum í 1988, eftir nýggjastu UEFA-samtykt frá í fjør, ið bert loyvir sjálvstøðum londum at gerast limir). Og tað var ikki neyðugt at spyrja nakrar politiskar myndugleikar í Danmørk, tað var nóg mikið við tilsøgn frá DBU og hinum norðurlendsku fótbóltssambondunum. Men ikki í hesum førinum (limaskap Føroyar í IOC), her má staturin Danmørk vera við til tað. Men tað eru danir eftir øllum at døma ikki, og rætt hava teir!

# Børnini hava RÆTT til lívið

**Jónfinn Olsen**



Í samband við tosið um barnaansing er ein rættur ella eitt krav, so er ongin ivi um, sum samfelagið er uppbygt, at børnini hava RÆTT til barnaansingarpláss. Men børnini hava eisini RÆTT TIL LÍVIÐ.

Miðflokkurin arbeiðir fyri at verja RÆTTIN hjá tí ófødda barninum til lívið. Hetta er ein RÆTTUR, sum børnini hava, longu áðrenn tey eru fødd. Men spurningurin er, verður hesin RÆTTUR hjá tí ófødda virdur í landi okkara, svarið er tíverri nei. Men Miðflokkurin arbeiðir fyri, at verja lív og RÆTT hjá tí ófødda barninum. Tekur tú undir við, at ófødda barni ikki verður tikið av døgum, men hevur RÆTT TIL LÍVIÐ og at liva sum menniskja skapt av Gudi, so stuðla MIÐFLOKKINUM til komandi Løgtingsval, við at atkvøða fyri Miðflokkinum ella eitt av valevnum tess.

MIÐFLOKKURIN tín rødd á Løgtingið.

# Trivnaður og vinnulív hond í hond

**Leivur Hansen**
*tjóðveldisvalevni í Suðurstreymi*



At samanhangur er millum trivnaðar- og vinnupolitikk, er ein tann týdningarmesti tátturin í dagsins samfelag.

Almennu trivnaðarskyldunum tørva eitt dynamiskt og sterkt vinnulív, sum kastar av sær til samfelagið.

Hinvegin tørvar vinnuni ein vælvirkandi almennan sektor, ið tryggjar útbúgving, gransking, heilsurøkt, eldrarøkt, barnaansing, serforsorg, samferðslu, flutningskervi, mentanartilboð, umhvørvis- og góðskueftirlit.

Tjóðveldisflokkurin leggur dent á ein greiðan vinnulívspolitikk, sum leggur tryggar karmar um eitt sjálvberandi og fjøltáttað vinnulív - við einum greiðum býti millum alment og privat.

Vit vilja hava eina studningsfría og stolta vinnu, har vinnan átekur sær og verður áløgd skyldur mótvegis umhvørvi, arbeiðsumhvørvi, trivnaði og eftirútbúgving hjá starvsfólkinum.

Og har vinnan eisini átekur sær skyldur til, at lívið eftir arbeiðstíð og eftir pensjónsaldur er nøktandi og trygt.

Grundarlagið undir trivnaðarpolitikki flokssins er, at vit hava eitt samhaldsfast samfelag, har tær breiðastu herðarnar gjalda meira enn tær smalru.

Tey, sum orsakað av sjúku, elli, vanlukku ella arbeiðsloysi ikki hava møguleikar at uppihalda sær og sínum, skulu hava alla hjálp og stuðul.

Tiltøk skulu setast í verk, sum byrgja fyri sosialari trongstøðu. Hetta gerst best við at tryggja fólki arbeiði og arbeiðið, sum ikki er heilsuskaðiligt. Aðrar fyritreytir eru reint umhvørvi og tak yvir høvdið.

At geva brekaðum mannsømulig kor og rættindi eigur at vera sjálvsagt. Arbeiðið við umstøðum teirra brekaðu eigur at verða betur skipað og ikki sum higartil í ov stóran mun vera treytað av, um vælvildin er til staðar ella ikki.

Sjúkrahúsverkið er dýrt at reka, og tí eigur størri dentur at verða lagdur á fyribyrgjandi heilsutænastu. Og her eigur ikki minst góður og sunnur matur til skúlabørn og eldri at verða raðfestur frammarlaga.